## Kanska teir seinastu

Sambært grønlendska flokkinum IA er tað ikki óhugsandi, at fólkatingsumboðini, sum verða vald í Grønlandi tann 13. november, verða tey seinastu grønlendsku umboðini á Christiansborg. Tað sigur formaðurin, Kupik Kleist, við blaðið AG, og tað sama sigur fólkatingsvalevnið hjá flokkinum, Josef Motzfeldt. Teir báðir siga, at aftan á 2009 hevur heimastýrið yvurtikið so nógv málsøki, at tá verður ikki longur neyðugt við umboðan í Fólkatinginum.



## Kuldi órógvar flúgving

Teir seinastu dagarnar hevur kuldin órógvað flogferðsluna í Íslandi. Fyrst fór eitt flogfar, sum kom úr Turkalandi við ferðafólki, á glið á flogvøllinum í Keflavík, og eitt annað flogfar, sum kom úr USA, noyddist at seta seg á Egilsstøðum, tí ísur var á vøllinum í Keflavík. Í einum triðja føri legðist ísur í hurðarkarmin á einum Fokker-flogfari, sum skuldi av Akureyri til Reykjavíkar, so trýstið inni í flogfarinum var ov lágt.

# Føroyar góvu honum fobi



*- Tað er ikki uttan grund, at eg í nógv ár havi kallað mín gamla bygdaskúla fyri »helviti á jørð«, sigur ein bersøgin Helgi Breiner, sum saman við foreldrunum flutti til Gøtu, tá hann var 8 ár.*



**Eftir fimm ár við støðugari og gjøgnumførdari happing í einum føroyskum barnaskúla, sum Helgi Breiner kallar »helviti á jørð«, tók tað honum mong ár og nógv stríð aftur at fáa grundleggjandi álit á menniskju og mót upp á lívið**

HAPPING
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun Jóannesarson Hansen*

Fyri fyrstu ferð í sjey ár hevur Helgi Breiner verið aftur í Føroyum. Eitt land, sum hann ikki hevði roknað við at sæð aftur. Tí hóast hann er føroyingur, so hava minnini um happing og forfylging í føroyskum bygdaskúla fylt so nógv, at tað hevur oyðilagt alt ov nógv í lívinum hjá honum.

- Mín søga um happing byrjaði í 1980. Foreldrini hjá mær fluttu til Gøtu og eg byrjaði í øðrum flokki í Gøtu skúla, greiðir Helgi Breiner frá.

Tað sum skuldi vera ein flyting til eina friðarliga bygd var byrjanin til eina ræðutíð. Eina ræðutíð, sum gav Helga Breiner so varandi mein, at hann ikki slapp burtur úr ótryggleikanum og fobiunum, fyrr enn hann hevði gingið bæði á fobiskúla og verið hjá healara.

Í dag býr Helgi Breiner í Keypmannahavn og arbeiðir sum organistur við Frederikssunds Kirkju. Hann er giftur kenda danska rithøvundanum, Cæcilie Lassen, og tey eiga tvær døtur. Hann hevur tað gott í dag men sigur, at um hann ikki hevði verið ígjøgnum sína grøðingartilgongd, so hevði hann ikki verið førur fyri at vitja Føroyar aftur.

Helgi Breiner gleðist um, at happing er komið á breddan í føroyska fólkaskúlanum, og orsøkin til, at hann fortelur sína søgu, er ikki, at fólk skulu taka synd í honum, men heldur skilja, hvat happing ger við menniskju.

### Ein skúli í kaos

Burtursæð frá tí fyrstu tíðini, varð Helgi Breiner happaður alla tíðina, hann gekk í barnaskúlanum í Gøtu. Hetta var ein happing, sum til tíðir fekk karakter av forfylging.

- Skúlin var eitt satt kaos. Teir flestu lærararnir møttu sjáldan til tíðina. Sum oftast komu lærararnir 20-30 minuttir ov seint til tímarnar og tað var als ikki óvanligt, at lærararnir ikki komu til tíman, sigur Helgi Breiner.

Og tá eingir lærarar vóru, vóru tað teir sterkastu næmingarnir sum settu dagsskránna, og tað var sjálvdan stuttligt fyri teir veikastu. Sama skil var í fríkorterunum.

- Fríkorterini vóru tí ein stórur partur av skúladegnum, og eg minnist meg ikki at hava sæð eina garðvakt úti í fríkorterunum. Tað vóru púra leysir teymar. Í praksis Darwin'sa junglulóg, har tann sterkasti ræður.

Men hóast lærarnir vóru nógv burturstæddir, so undrar tað álíkavæl Helga Breiner, at eingin vaksin uppdagaði nakað.

- Eg skilji ikki hvussu tað bar til, at smá børn framdu álvarsom sálarlig brotsverk - og óivað ikki bara ímóti mær - uttan at nakar vaksin legði merki til tað ella gjørdi nakað við tað, sigur hann avgjørdur.

### Happingarmentan

Hann heldur eisini, at tey vaksnu hava ábyrgd á ein annan hátt, tí børn kopiera tað happingarmentan, sum tey síggja hjá teim vaksnu. Børnini duga bara ikki at pakka happingina inn. Helgi Breinir nevnir slatur og sarkasmu í familjum, á arbeiðsplássum, í kirkjum og í politikki sum dømi um happingarmentan.

- Í mínum eygum er tað tí minni áhugavert, hvat børnini kallaðu ella slatraðu um meg á skúlanum ella í frítíðini. Heldur ikki er tað áhugavert at eg ein dagin varð forfylgdur á veg heim av trimum dreingjum frá klassanum, sum oyðiløgdu súkluna hjá mær, tí eg hevði svarað aftur.

Tað óhugnaliga og álvarsliga er, hvat happingin ger við menniskju, leggur Helgi Breiner herðslu á.

Og tøgnin heldur happingini á lívi. Í skúlanum í Gøtu var ongantíð tosað um happing. Happing var ikki til.

- Happing var tabu á skúlanum, og ikki fyrr enn vit fingu ein danskan flokslærara, Grethe Grue Sørensen, í sætta flokki, varð orðið nevnt.

### Varandi mein

Hóast happingin stegðaði, tá hann kom í framhaldsdeildina í Fuglafirði, hava upplivingarnar í barnaskúlanum forfylgt Helga Breiner í nógv ár. Happingin vardi í veruleikanum í 25 ár, sigur hann, tí so leingi hevur hann livað við meinunum.

- Eg havi havt ein stóran ótta fyri menniskjum og verið bangin fyri at verða happaður aftur. Hóast tað ikki hendi, hevur óttin forfylgt mær, og kom at stýra mín-